UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **12. mars 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-131**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-093/2020 eftir Tingskipanini § 52 a frá Ingilín Didriksen Strøm, løgtingskvinnu, um raðfesting av sernámsfrøði á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya, settur landsstýrismanninum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar orsøkir eru til, at sernámsfrøði ikki verður ein vallærugrein á námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya næsta skúlaár?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rætt at niðurraðfesta lærugreinar, sum styrkja førleikarnar hjá námsfrøðingum og lærarum at lofta børnum við sálarligum avbjóðingum, tá vit vita, hvussu gongdin er á hesum økinum?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta onnur átøk í verk, sum styrkja um førleikarnar hjá námsfrøðingum og lærarum til at lofta børnum og ungum við sálarligum avbjóðingum?

Svar

Til 1: Sernámsfrøði verður bjóðað út sum vallærugrein á námsfrøðiútbúgvingini komandi lestrarár, men ikki í læraraútbúgvingini.

Sambært ásetingunum í § 7 stk. 3 í kunngerðini um útbúgving av fólkaskúlalærarum og námsfrøðingum frá 2009 hevur Setrið skyldu til at veita 22 ymiskar linjulærugreinir til lesandi í 3. og 4. lestrarhálvu í læraraútbúgvingini. Av tí at talið á teimum lesandi er avmarkað, ber ikki til at seta allar 22 linjulærugreinirnar á skrá á hvørjum ári. Hetta atlitið merkir, at linjugreinir ikki eru tær somu hvørt ár, og millum annað av hesi orsøk verður sernámsfrøði ikki bjóðað út á læraraútbúgvingini í lestrarárinum 2021/2022.

Innan lærarayrkið hava verið fleiri røddir, sum hava víst á, at tað er týdningarmikið, at nýútbúnir lærarar hava linjulestur í lærugreinum, sum eru kravdar í undirvísing fólkaskúlans. Samstundis eru ynski um at fáa sett í verk skipaða eftirútbúgving innan onnur øki enn í kravdu lærugreinunum, her ímillum sernámsfrøði. Sernámsfrøði er ein týðandi partur í undirvísing fólkaskúlans, sum allir lærarar eiga at hava ávíst innlit í, og er sernámsfrøði tí partur av læraraútbúgvingini hjá øllum læraralesandi.

Hóast sernámsfrøði ikki verður bjóðað út sum linjugrein, er sernámsfrøði partur av skeiðsrøðini "Undirvísing og læring II og III", sum eru kravd undirvísingarevni í læraraútbúgvingini. Tað merkir, at øll, sum lesa til lærara, fáa ávíst innlit í sernámsfrøði.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Sernámsfrøði hevur í nøkur ár verið bjóðað út sum samlesturlinja, har bæði læraralesandi og námsfrøðlesandi hava fylgt somu undirvísingarskeiðum. Hetta skúlaárið hevur sernámsfrøði tó verið skipað øðrvísi, so at námsfrøðilesandi fylgja einum skeiði, meðan læraralesandi fylgja einum øðrum. Við hesi umlegging hava fakbólkarnir fingið eina meira málrættaða tilgongd til sernámsfrøðina við undirvísing og atliti at egnum fakøki. At sernámsfrøðin á henda hátt er tillagað til fakøkini eigur ikki at verða sæð sum niðurraðfesting, men heldur menning av sernámsfrøðini innan yrkini sum ávikavist lærari og námsfrøðingur.

Leggjast kann afturat, at gongdin á sernámsfrøðiliga økinum hevur verið positiv seinastu árini, tí at lesandi á bæði námsfrøði- og læraraútbúgvingini í øktan mun hava valt sernámsfrøði sum linjufak. Her kann ávísast, at linjulærugreinin innan sernámsfrøði hevur flest lesandi á námsfrøðiútbúgvingini, meðan tað einans er støddfrøði á læraraútbúgvingini, sum hevur fleiri lesandi.

Til 2: Landsstýrismaðurin heldur ikki, at tað er rætt at niðurraðfesta lærugreinir, sum styrkja førleikarnar hjá námsfrøðingum og lærarum at skipa og leggja til rættis undirvísing, trivnaðar- og menningarátøk til børn við sosialum, sálarligum, menningarligum avbjóðingum v.m.

Landsstýrismaðurin metir ikki, at økið er niðurraðfest, tí at:

1) Námsfrøðiútbúgvingin fer at bjóða út sernámsfrøði
2) Skeiðsrøðin Undirvísing og læring II og III geva sernámsfrøðiligt innlit og er kravd lærugrein.
3) Vallærugreinin í sernámsfrøði í læraraútbúgvingini er ikki strikað, men verður tó ikki bjóðað út komandi lestrarár.
   Landsstyrismaðurin fer at fylgja gongdini og seta seg í samband við Setrið um sernámsfrøðiliga partin í lærugreinaøkinum, Undirvísing og læring.

Til 3: Seinastu árini hava fleiri átøk verið sett í verk at førleikamenna føroysku fólkaskúlalærararnar. Hetta fevnir um lesivegleiðarar, støddfrøðivegleiðarar, serlærarar, skúlabókavørðir, skúlavegleiðarar og orðblindalærarar. Landsstýrismaðurin er í holt við at lýsa tørvin á eftirútbúgvingum og seta eina skipaða tilgongd í verk, so at útbúgvingarnar verða bodnar út við jøvnum millumbili. Hetta arbeiði verður gjørt í samráð við Setrið og aðrar avvarðandi partar.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo